


# Toskurin suðuri í Norðsjónum næstan horvin



*Danski havbiologurin, Michael Andersen, sigur, at toskurin er hildin uppat at gýta har suðuri í Norðsjónum*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Ein kanning, sum 350 ES-fiskimenn luttóku í fyrr í heyst, vísir, at stórur munur er á toskastovninum í syðra og norðrara parti av Norðsjónum.

Fiskimenn, sum fiska har suðuri, siga, at minni er av toski í ár enn í fjør. Flestu teirra, sum fiska í norðara partinum, siga hinvegin, at har er meira toskur enn árið fyri.

**Fiska yvir vrakum**

Norski havgranskarin, Odd Smedstad, heldur, at munurin millum syðra og norðrara part av Norðsjónum skyldast, at toskurin er uppfiskaður heilt har suðuri.

Hann vísir á, at mest er at fáa í norskum øki í Norðsjónum, og har er veiðitrýstið minst.

Ein partur av veiðini har norðuri fer fram yvir vrakum, sum liggja á botninum og aðrastaðni, har ikki er atkomandi við troli.

Har norðuri verður toskurin veiddur á djúpri vatni.

Landingartøl í Noregi vísa, at nøgdirnar av toski úr Norðsjónum í ár eru størri enn í fjør. Sama er galdandi fyri Skagerak.

**Toskurin gýtir ikki**

Danski havbiologurin, Michael Andersen, sigur, at toskurin er hildin uppat at gýta har suðuri í Norðsjónum.

Hann heldur tí, at granskarar mugu rokna við einum nógv lægri gýtingarstovni, soleingi fiskur bara er í helvtini av økinum.

Norski granskarin, Odd Smedstad, ivast í, um veðurlagsbroytingar eru orsøkin til niðurgongdina, tí niðurgongdin byrjaði, áðrenn broytingarnar vórðu staðfestar.

- Spurningurin er nú, um vit skulu bjarga fiskinum - ella fiskimonnunum, sigur hann.

Sum skilst, fer ES at stuðla fiskimonnum, sum missa inntøku, tí kvoturnar verða minkaðar.

## Australia tekur veiðitjóvar

**Australia:** Vaktartænastan í Australiu hevur havt nógv at gera í ár við at taka skip, sum hava fiskað ólógliga í australskum sjógvi.

Fram til seinnapartin av november, hevði vaktartænastan tikið tilsamans 84 útlendsk skip fyri ólógliga veiði.

Í eina viku miðskeiðis í november, tók vaktartænastan trý indonesisk skip, sum vóru á ólógligari hávaveiði.



*Australsk vaktarskip fara helst at taka einar 100 veiðitjóvar í ár.*



# Størri rækjukvota í Grønlandi



*Grønlendska rækjuvinnan fegnast um tilmælini um økta rækjukvotu komandi ár.*

**Grønland:** Havgranskarar við grønlendska Náttúrustovnin mæla til, at rækjukvoturnar undir Grønlandi verða øktar úr 85.000 tonsum í ár uppí 100.000 tons komandi ár.

Grønlendska rækjuvinnan, sum er hin týdningarmiklasta vinnan í landinum, fegnast um tilmælið.

Samstundis, sum lívfrøðingarnir komu við sínum tilmæli, fekk grønlendska fólkið eisini at vita, at tjóðarbúskapurin í landinum er betri fyri, enn roknað hevur verið við. Ein fíggjarlig stagnatión í fjør vísir seg nú at vera av.

Skattainntøkurnar veksa, og útflutningurin av rækjum vísir eisini ein góðan vokstur, sum væntandi fer at halda fram komandi ár við øktu rækjukvotunum.

*-v.*

# Spania krevur atgongd í Írlandi



*Tað er ikki fallið í góða jørð í Írlandi, nú spanskir fiskimenn krevja at sleppa at fiska í "írska kassanum".*

Spania: Reiðaríir í Spaniu streingja nú meira á til tess at sleppa at fiska í sonevnda "írska kassanum".

Írska stjórnin hevur higartil noktað Spaniu atgongd til hesar leiðir, hóast bæði londini eru limir í ES. Spaniumenn halda, at hetta stríðir ímóti ES-reglunum.

Spaniumenn eru serliga áhugaðir í "írska kassanum", sum liggur úr 12 og út á 50 fjórðingar úr írsku strondini.

Krøvini hjá spaniumonnum eru vorðin meira treingjandi, nú fiskivinnan í landinum eisini verður rakt av skerjingum í Norðsjónum og aðrastaðni í Norðuratlantshavi.

ES mælir til, at írsku myndugleikarnir taka upp samráðingar við myndugleikarnar í Spaniu.

Sum skilst, hava tíðindini um sponsku krøvini, loypt øði í írsku fiskimenninar, sum ikki vilja hava sponsk skip í írskan sjógv.

-v.

# Blair lítlan áhuga í fiskivinnuni

Bretland: Forsætisráðharrin í Bretlandi, Tony Blair, varð herfyri lagdur undir at hava lítlan áhuga í fiskivinnuni í Stórabretlandi, sum nú gongur ímóti eini stórari kreppu.

Havgranskarar fara saman við ES fremja stórar niðurskurðir í kvotunum í Norðsjónum, og væntandi er, at tað í ólukkumát fer at koma bretsku fiskivinnuni aftur um brekkur.

Eitt orðaskifti í bretska parlamentinum herfyri vísti, at stjórnin ikki hevur tikið nøkur stig til at ávirka tey tiltøk, sum fremjast skulu í Norðsjónum.

Tony Blair segði, at myndugleikarnir fara at tosa við umboð fyri bretsku fiskivinnuna til tess at finna leiðir, sum kunnu hjálpa vinnuni úr kreppuni, nú ráðharraráðið hjá ES hevur sagt, hvussu fiskiskapurin í Norðsjónum skal skerjast.

*-v.*




